LM-105/2020

Fylgiskjal 8

Eftirlønargrunnur FA's
Stoffalág 17 • 100 Tórshavn
Tlf. +298 312101
eftirlon@fafelag.fo • www.fafelag.fo

Tórshavn, hin 22. Januar 2021

Viðmerkingar frá Eftirlønargrunni Føroya Arbeiðarafelags

Vit síggja í ætlaðu lógarbroytingunum viðvíkjandi grannskoðanarvirksemi og ígildissetan av ES-fyriskipan, at ætlanin er at áleggja feløgum, sum koma undir PIE hugtakið, javnan at skifta, ikki bert grannskoðara, men eisini at skifta grannskoðaravirki.

Vit vilja staðiliga ávara ímóti at slík regla verður sett í gildi í Føroyum, tí hetta fer í ólukkumát at hava neiliga ávirkan á t.d. ein grunn sum eftirlønargrunn okkara.

At veita einum eftirlønargrunni haldgóða ráðgeving krevur serligar førleikar hjá grannskoðara, og tá vit hyggja at avmarkaða talinum av grannskoðaravirkjum í Føroyum, so vil ein slík lóggáva heilt vist gera, at t.d. eftirlønargrunnar og tryggingarfeløg koma í eina støðu, har vit ikki hava møguleika at velja grannskoðara, sum hevur neyðugu førleikarnar at veita okkum ráðgeving innan eitt øki, sum veruliga krevur serkunnleika.

At seta í gildi eina skipan, har álagt verður okkum javnan at skifta grannskoðaravirki fyri at tryggja móti vandanum fyri ógegni, kann als ikki standa mát við tær avleiðingar hetta heilt vist fer at fáa fyri dygdina av tí grannskoðaraarbeiði og ráðgeving, sum framyvir verður gjørt/veitt inna eitt øki sum okkara.

Yvirskipað halda vit, at hetta uppskot fer alt ov langt í reguleringini av spurninginum um, hvønn grannskoðara eitt felag kann velja, men serliga halda vit, at tað ber ikki til heilt ókritiskt í Føroyum at seta í gildi reglur, sum heilt sjónliga eru gjørdar fyri lond, sum eru heilt øðrvísi skipaði, og har hundraðtals grannskoðaravirkir virka. Tað má bera til at lúka út í uppskotum til lógarbroytingar, soleiðis at tann fyrimunur, sum møguliga verður av slíkum reglum ikki fær nógv størri neiligar avleiðingar, og sum í ringsta føri fer at gera, at feløgini framyvir koma at hava verri við at lúka treytirnar fyri haldgóðari grannskoðan og fakligari ráðgeving á nøktandi støði.

Mælt verður tískil staðiliga frá at seta hetta í verk ella sum minsta mark gera undantøk í PIE ásetingunum, so at hetta slag av virksemi verður undantikið. Frammanundan er hetta væl skipað við eftirlitið frá tryggingareftirlitinum umframt at grannskoðararnir sjálvir eru undir herdum eftirlitið.

Vinaliga

Eftirlønargrunnur FA's